# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óneyðuga drúgvir verkir

Kommunutalið er nógv lækkað, og søgan er kend. Partur av Tórshavnar uttanbýggja kommunu varð lagdur saman við Tórshavnar kommunu. Tá kom tað ikki upp á tal, at Argir skuldi verða partur av høvuðsstaðarkommununi. Men nú eru longu fleiri ár síðani, at Argir gjørdist partur av TK, og nú er tað, sum fyri nøkrum árum síðani var púra óhugsandi, veruleiki, sum tað heilt víst ikki hevði fingist meiriluti fyri at fara frá aftur.

Síðsta skotið á samanleggingar bulinum er, at Svínoyar kommuna og Klaksvíkar kommuna leggja saman. Svínoyingar halda seg ikki hava annað val, um teir skulu hava møguleika at liva upp til tað, sum tað sigst fara at verða roknað við og kravt av kommununum.

Álitið um framtíðar kommunubygnaðin varð alment fyri nøkrum árum síðani. Tilmælið var greitt. Um fleiri uppgávur skuldu leggjast til kommunurnar, so skuldu tær skipast í størri eindir - 7-9 varð nevnt. Landsmyndugleikin valdi ikki at fara fram við pískinum, men heldur við gularótini. Í staðin fyri at lóggeva kommunurnar saman í færri og størri eindir, varð sagt, at tá ið kommunurnar høvdu skipað seg í størri eindir, fóru tær at fáa fleiri uppgávur og avbjóðingar.

Royndin at blása og hava mjøl í munninum er ikki ókend. Landspolitikararnir hava higartil ikki viljað lagt kommunurnar saman við lóg, men kortini verður roynt at leggja uppgávur út. Samanleggingin skal ganga av sær sjálvum. Fólkaatkvøðurnar í eitt nú Gøtu og Leirvík og í Sundalagnum hava víst, at tað er undirtøka fyri samanleggingum. Men kortini tykist tað ganga spakuliga at fáa færri og størri kommunur. Kommunalpolitikararnir eru kanska minni hugaðir, enn veljararnir eru fyri at leggja saman

Í Norðoyggjum eru sjey kommunur (seks tá ið Svínoy og Klaksvík hava lagt saman). Í Eysturoy er talið umleið tað sama, Vestmanna og Kvívík, Vágarnar og Sandoy og Suðuroy hanga framvegis í leysum lofti, um tað ber til at orða tað soleiðis.

Kommunurnar fara at verða færri og størri. Men hvussu long skal tíðin verða, áðrenn samanleggingarnar eru fingnar frá hondini? Er tað best fyri samfelagsmenningina, at hetta framvegis skal ganga av sær sjálvum? Ella hevði tað verið betri – og kanska ein hjálp fyri tøvandi kommunal politikararnar og veljararnar, sum vilja leggja saman – um lóggevararnir nú gjørdu tað av, sum annars fer at taka fleiri ár at fáa í lag?

Tað hevði verið rætt av tinginum at tikið kommunuspurningin aftur til viðgerar, hóast løgtingsvalið ikki er so langt burtur. Kanska átti tingið nú at átikið sær uppgávuna sum jarðamóður fyri nýggju kommunuføðingunum. Tað er hvørki heppið fyri barnakonuna ella barnið, at burðartíðin er long, og at verkirnir eru óneyðuga drúgvir og meinir. Meðan tað verður bíðað, ber tað ikki til at gera so nógv annað - enn at bíða!

**Sosialurin**

## Inhabilitetur og elitan

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður



Umráðandi at vera objektivur, áðrenn tú dømir inhabilitetin, og tvingandi neyðugt er, at løgtingsumboðanin hevur fólksliga breidd. Almenna um- og fyrimsitingin krevst mannað við dugnaligum og bókliga vælútbúnum fólki, sum gerst elita hvør á sínum øki.

Ofta er at síggja og hoyra í fjølmiðlum, at vinnulívsfólk eru inhabil í politiskum arbeiði so væl sum í leiðandi nevndarsessum innan fíggjarheimin ella stovnum, sum eru við til eitt nú at játta fígging til eitt hvørt endamál.

Samstundis halda fólk við ymiskligum bókligum útbúgvingum, at løgting, bý- og bygdaráð, nevndir og játtandi myndugleikar átti at verið ein elita av bókliga vælútbúnum fólki, uttan tó beinleiðis at staðfesta, hvussu langa – ella drúgva – bókliga útbúgvingin eigur at vera, ella hvussu henda elita eigur at verða uppbýtt.

Ein demokratisk stýrisskipan – sum Winston Churchill segði um, at hóast hon ikki er góð, so tó tann besta hann enn hevði sæð – er nevniliga grundfest við tí fyri eyga, at geva eina breidd, við eini so ymiskligari vitan og umboðan av fólkinum sum gjørligt.

**Búskapargrundarlagið og raðfestingar**

Ein elita kann t. d. vera á listarliga økinum. Listin er ótrúliga víðfevnd, hon fevnir eisini um vinnulívið, har ikki so fáir listarligir vinnulívsúrmælingar hava verið og eru.

Í seinastuni hava vit m. a. sæð tveir listamenn, sum halda nógv um tað, teir sjálvir leggja úr hondum: Ole Wick og Carl J.Jensen. Teir eru ovfarnir av, at so fá hava lagt til merkis teirra hendinga ríku skapanarevni, sum teir meta liggja hópin hægri enn hjá øðrum í Norðurhøvum. Her hava vit í øllum førum tvey dømi um raðfestingar.

Føroya løgting er breitt samansett av minst 12 ymiskum yrkistættum. Hetta er demo-kratiið! Tó mást tú staðfesta, at búskaparevnini altíð avgera grundarlagi undir hvørji samtykt og raðfesting. Her verða altíð ymiskar meiningar um rættleika og visjónir.

**Inhabilitetur og objektivitetur**

Hví er tað so, at tá vinnulívsfólk ella fiskimenn gera sína vitan galdandi á tingi, og koma við tilmælum, tá talan er um vinnupolitikk, fiskivinnu ella í handilsligum høpi, ella t.d. tá borgarstjórar tosa um síni geografisku øki úti um landið, at hesi týðiliga, bæði av tinglimum og fjølmiðlum verða skýrd inhabil. Hesi verða sjáldan vard!

Men t.d. tá lækni á tingi gevur til kennar sína meining, trýstir á og krevur ábøtur innan heilsuverkið, ella t.d. lærari trýstir á útbyggingar innan útbúgvingarverkið, og krevur hægri játtanir til rakstur, hóast játtanirnar stórliga eru øktar seinastu árini, verður so gott sum ongantíð tosað um inhabilitet, men ávís tingfólk, sum eru tilknýtt hesum stovnum, taka undir, og verða væl skorða undir av fjølmiðlum.

**Tíðindaflutningur og tingfólkametingar**

Hví hetta er so, havi eg einki beinleiðis boð uppá, hóast eg havi mína meting, men lat meg siga, at tað eru hóast alt mong, sum gera sær sínar tankar um subjektivan tíðindaflutning og hesar skeikladu metingar eisini framdar av ávísum tingfólkum.

Umráðandi er at vera objektivtur, áðrenn tú dømir inhabilitetin, og tvingandi neyðugt er, at løgtingsumboðanin hevur fólksliga breidd. Almenna umsitingin krevst mannað við dugnaligum og bókliga vælútbúnum fólki, sum gerst elita hvør á sínum øki, um vit skulu vinna longur fram við altjóðagerðini.

## Tjóðveldis-geykaungi í Sambandsflokkinum?

**HANS BRYNJÁLVUR DANBJØRG**
Porkeri

Halgabók lærir okkum at eitthvørt træ, skal kennast á fruktum tess.

Tjóðveldismenn fagna nýggja fíggjarmálaráðharranum sum teirra egna manni, ja, teir eru til reiðar at ofra borgarstjóran á Sandi fyri at fáa "fullveldis-grunnin" upp á pláss.

**Samgongan er ørkymlað**

Tað hoyrdist, at sambandsmenn høvdu skotið seg sjálvar í fótin, tá nýggjur fíggjarmálaráðharri skuldi veljast.

Men her tykist, sum um gamla Sambandi hevur skotið høvdið av sær sjálvum.

Teir hava nokk snorksovið í tímanum, tá søgan um tann "Trojanska hestin" var fyri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.